# – Eg varð stungin í ryggin

**– Eg hevði tryggjað mær nóg stóra undirtøku til at verða valdur til formann í sambandsflokkinum, men nøkur lupu frá og stungu meg í ryggin, sigur Johan Dahl, sum kortini ikki er beiskur, nú hann sigur sambandsflokkinum farvæl**

SAMBANDS-FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Flokkurin hevur onki álit á mær longur. Og eftir tað, sum hendi fíggjakvøldið, kann eg heldur ikki hava álit á flokkinum longur.

Tað er tann kenslan, sum Johan Dahl, løgtingsmaður, situr við eftir landsfundin hjá sambandsflokkinum fríggjakvøldið.

Og tað hevur hann nú tikið avleiðingarnar av og um vikuskiftið meldaði hann seg úr sambandsflokkinum.

Tað hevur hann boðað floksleiðsluni frá nú um vikuskiftið.

Johan Dahl hevur boðað frá, at frá næsta tingdundi at rokna, umboðar hann ikki longur sambandsflokkin á Løgtingi.

Næsti tingfundur er mikudagin.

Kortini fer hann ikki at gevast í politikki, men ætlar sær at verða uttanflokkamaður.

Hann ger eisini greitt, at hann ætlar framvegis at stuðla samgonguni í teimum politisku málunum, sum sett eru út í kortið í samgonguskjalinum, tí tað heldur hann eru góð, politisk mál at seta sær.

### Stungin í ryggin

Johan Dahl staðfestir, at tað var onki ynski hjá honum sjálvum at stilla upp til valið sum formaður í sambandsflokkinum ímóti Kaj Leo Johannesen.

– Eg varð biðin um at stilla upp, tí fólk vóru ónøgd við Kaj Leo Johannesen sum formann og sum tískil hildu, at tað var rætt at fáa nýggjan formann fyri at fáa meiri kraft í flokkin uppundir valið, sum verður um hálvtannað ár í eini roynd av vinna eitt komandi løgtingsval.

Men Johan Dahl sigur, at hann vildi bara stilla upp, vissi hann fekk tryggjað sær nóg stóra undirtøku til at vinna valið.

– Tað hevði eg eisini tryggjað mær, heilt fram til seinasta minutt fyri formansvalið og eg fekk eisini váttað frá einum meiluta av teimum, sum høvdu vælrætt, at eg hevði nóg stóra undirtøku til at vera formaður.

Men tá ið, avtornaði manglaði Johan Dahl seks atkvøður í at verða valdur.

Tí dylir hann heldur ikki fyri at hann følir seg stungnan í ryggin.

– Eg hevði longu gjørt tað greitt fyri mær sjálvum, mínari konu, mínum børnum og mínum næstringum annars, at varð eg ikki valdur, skuldi eg siga meg úr flokkinum fyri at brúka tíðina øðrvísi.



*Tað var meiri enn ein Judas á landsfundinum hjá sambandsflokkinum fríggjakvøldið, sigur Johan Dahl.*

Johan Dahl sigur, at nú fer hann sostatt at brúka meiri tíð til ta vinnuliga virksemi, hann hevur gongd í, bæði í Vági og í nýggja felagnum hann hevur verið við til at stovna í Danmark

– Mín niðurstøða er, fólk, sum lovaðu at stuðla mær, eru lopin frá sínum lyftum.

Hann sigur, at so vítt, hann hevur dugað at roknað tað út, var tað bara ein í tingmanningini, sum atkvøddi fyri honum sum formanni, øll hini atkvøddu fyri Kaj Leo

– Tá ið eg havi so lítið álit ímillum sambandsfólk, dugi eg ikki at síggja, at eg havi nakra framtíð í flokkinum.

– Eg dugi heldur ikki at síggja, hvussu flokkurin hevur brúk fyri einum manni, sum hann hevur so lítið álit á, sigur Johan Dahl.

Hann leggur kortini stóran dent á, at hann er als ikki beiskur, nú hann sigur flokkinum farvæl.

Hann vil eisini fegin takka teimum, sum hava stuðlað honum.

– Eg fari ikki úr sambandsflokkinum tí at eg tapti valið. Eg fari úr flokkinum, tí tey, sum høvdu lovað at stuðlað mær, sviku tá ið á stóð og slíkt álitisbrot kann eg ikki liva við, sigur Johan Dahl.

### Endar um hálvtannað ár

Hann sigur, at sum tað sær út í løtuni, endar hansara politiski leiklutur á Løgtingsvalinum, sum verður um hálvtannað ár.

Hann hevur sostatt ikki hugsað um at melda seg inn í ein annan flokk.

Hann hevur heldur ikki hugsað um at stovna nýggjan flokk á komandi løgtingsvali.

Men hann leggur kortini afturat, at gongst sum ætlað, verður løgtingsvalið ikki fyrrenn um hálvtannað ár og tað er long tíð, so nógv kann broytast til tá.

# Takkar Johan Dahl fyri trúgva tænastu

**Formaður sambandsfloksins harmast um, at Johan Dahl hevur meldað seg úr flokkinum, men hann heldur, at hetta var eitt víðgongt stig at taka**

SAMBANDS-FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kaj Leo Johannesen, formaður sambandsfloksins harmast um, at Johan Dahl hevur meldað seg úr flokkinum.

Men hann kann ikki annað enn virða avgerðina og samstundis takka Johan Dahl fyri drúgva tænastu.

– Johan Dahl hevur sín egna, fría vilja og nú hann hevur meldað seg úr sambandsflokkinum, er tað hansara fulli rættur og tað taka vit til eftirtektar.

– Vit vóna kortini, at vit fáa eitt gott samstarv við hann hereftir.

Johan Dahl tók tapið á formansvalinum sum eina misálitisváttan, men tað er sambandsformaðurin ikki samdur í.

Skuldi tað verið ein misálitisváttan at tapt eitt val á hendan hátt og skuldu øll melda seg úr einum á flokki fyri tað, hevði tað ikki verið nógv fólk eftir í teimum ymsu flokkunum.

Kortini helt Kaj Leo fríggjakvøldið á landsfundinum, at tað er eitt ov víðgongd stig at taka at melda seg úr.

– Eg helt fíggjakvøldið, at tað er ein undarlig støða at taka, at bjóða seg fram sum formansvalevni ta einu



*Kaj Leo Johannesen*

løtuna og at melda seg úr flokkinum ta næstu løtuna.

### Missa nevndarsessir

Johan Dahl var ikki bara tingmaður fyri sambandsflokkin. Hann hevði eisini álitisstørv í flokkinum og eitt nú røkti hann tað sera týdningarmikla starvið at vera formaður í uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum.

Men tað starvið má hann eisini missa nú, heldur Kaj Leo Johannesen.

– Sambandsflokkurin eigur formannin í uttanlandsnevndini, so har verður Johan Dahl noyddur at víkja sætið, tí nú skal nevndin skipast av nýggjum og ein sambandsumboð veljast ístaðin, sigur formaðurin.

Johan Dahl umboðar eisini sambandsflokkin í trivnaðarnevndini, eins og hann er varalimur fyri flokkin í fíggjarnevndini og rættarnevndini.

Eisini teir nevndarsessirnar fyri sambandsflokkin missur hann, sigur Kaj Leo Johannesen.

Men so einfalt er hetta kortini ikki.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur, at Johan Dahl hevur boðað frá, at hann styðjar framvegis samgonguna.

Býtið av nevndarsessum er treytað av teimum valbólkum, sum eru avtalaðir og styðjar Johan Dahl framvegis samgonguna, er ongin broyting í valbólkunum. Sostatt verða nevndirnar heldur ikki umskipaðar uttan víðari. Sostatt verða nevndirnar ikki umskipaðar uttan so at avtalurnar um valbólk verða sagdar upp og nýggir valbólkar gjørdir.

Samgongan og sjálvstýrisflokkurin er í valbólki og Edmund Joensen metir, at verða vælbólkarnir umskipaðir, koma fleiri broytingar at henda.

Minnist løgtingsformaðurin rætt, er er valbólkurin hjá samgonguni og sjálvstýrisflokkinum akkurát nóg stórur til at varðveita sessin í Norðurlandaráðnum, so minkar valbólkurin ein tinglim, verður sessurin í Norðurlandaráðnum tann fyrsti sum rýkur.

### Stórur missur

Edmund Joensen, sum eisini hevur verið formaður sambandsfloksins, hevur annars ikki nógvar viðmerkingar til at Johan Dahl hevur meldað seg úr flokkinum.

Tað einasta, hann vil siga, er, at hann harmast um tað og at hetta er ein stórur missur fyri flokkin.

Hann vil heldur ikki siga, hvørjum hann hevur stuðlað í flokkinum.

– Eg geri tað, sum er best fyri sambandsflokkin, sigur hann.